SKÚLIN VIÐ LØGMANNABREYT

# Várroynd 2024

**<u>Góðu næmingar og foreldur í 9 flokki</u>**

Várroyndin í 9.fl. er seinasta venjingarroyndin í fyrireikingini til endaligu próvtøkuna. Niðanfyri eru tíðir og lærugreinir at síggja og á baksíðuni er kunning um reglur og forskriftir.

Blíðar heilsanir

Skúlin við Løgmannabreyt

Jón Kragesteen
varaskúlastjóri

510449 - jon.kragesteen@skulin.fo

| Týsdag<br>20. februar 2024 | Mikudag<br>21. februar 2024 | Hósdag<br>22. februar 2024 | Fríggjadag<br>23. februar 2024 |
|---|---|---|---|
| | | | |
| **Ensk<br>Máluppgáva<br>08:00 – 09:45** | **Donsk<br>Máluppgáva<br>08:00 – 09:45** | **Støddfrøði<br>Fimisrokning<br>08:00 – 09:15** | **Føroysk<br>Máluppgáva<br>08:00 – 09:45** |
| **Ensk framseting<br>10:15-13:15** | **Donsk framseting<br>10:15 – 13:45** | **Greiðslurokning<br>09:45 – 13:45** | **Føroysk framseting<br>10:15-13:45** |

**<u>Vend</u>**

# Reglur um royndir

**Reglur**
- Næmingarnir skulu sita klárir í royndarhølinum kl. 08:00 dagsetta dagin.
- Um so er, at næmingur møtir ov seint, skal viðkomandi møta á skrivstovuni - ella ringja til Jón á 510449.
- Um næmingur ikki fær møtt, skal skúlin hava boð frá foreldrunum um tað.
- Í royndarhølinum er friður!
- Hevur næmingur spurning, skal hondin verða rætt upp, og so er at bíða til vaktin kemur. Loyvt er ikki at rópa ella at gera annað tekin.
- Næmingar hava ikki loyvi til at reisa seg frá stóli sínum, uttan við loyvi frá vakti.
- Næmingar skulu ikki samskifta við nakran annan enn vaktirnar.
- Fartelefonir skulu vera sløktar og lagdar á avtalað stað.
- Næmingarnir hava frí, tá royndarhaldið er liðugt og skulu fara heim tá.

## Brot á fyriskrivaðu reglurnar kann føra til burturvísing

**Føroyskt, danskt og enskt**
- Royndirnar verða gjørdar á telduni, sum næmingarnir hava fingið frá skúlanum
- Næmingar skulu hava sítt egna "headsett" við.
- Næmingar, sum hava brúk fyri at lána "headsett" frá skúlanum, skulu boða frá á skrivstovuni í seinasta lagi fríggjadagin **16. februar 2024, kl.12**.
- Næmingurin kann brúka teldutøkar orðabøkur, sum t.d. www.sprotin.fo

**Fimisrokning**
- Royndirnar verða gjørdar á telduni, sum næmingarnir hava fingið frá skúlanum
- Í fimisrokning verður dentur lagdur á høvuðrokning. Ikki er loyvt at nýta roknimaskinu og heldur ikki forrit á telduni, sum kunnu nýtast sum roknimaskinur.
- Loyvt er at nýta bókina ”Støddfrøði – handbók”.

**Greiðslurokning - verður gjørd á pappíri!**
Her verður dentur lagdur á tað, ið vanliga verður nevnt ”problemrokning”. Her má næmingurin í størri mun skilja uppgávuna, finna upplýsingar til spurningarnar og loysa teir. Loysnin kann ikki standa einsamøll, men ein frágreiðing má vera, ið vísir, hvussu næmingurin er komin fram til loysnina.

Amboð at hava við til royndina í greiðslurokning eru:
- Blýantur
- Pennur
- Viskileður
- Linial
- Passari
- Vinkulmátari
- Tríkantur
- Roknimaskina
- ”Støddfrøði – handbók”
- Bøkur og annað tilfar úr undirvísingini